At greina og tulka myndir

Tað er umráðandi at hava í huga, tá ið tú greinar og brúkar ein frymil, at frymilin bara er eitt hjálparamboð. Frymilin er ikki lagaður til eina ávísa mynd, tí kann tað væl vera, at ikki alt, sum er nevnt í frymlinum, er at finna í eini mynd. Brúka frymilin soleiðis, at hann hóskar júst til tína mynd og legg tað aftur at ella burturúr, sum tú heldur ella ikki heldur, er viðkomandi fyri tína greining.

GG. *Minst altíð til at vísa á dømi í myndini og at grundgeva fyri tínum uppáhaldum.*

Nøkur orð og hugtøk í frymlinum eru litað *blá* og skrivað við skákskrift. Í høgra bredda standa orðafrágreiðingar til hesi orð og hugtøk.

Byrjan

Kanna myndina væl og virðiliga

Um myndina

Greið frá tí, sum tú veitst um myndina, so sum

- hvør hevur gjørt hana
- nær er hon gjørd
- hvussu er hon gjørd (tilfar)
- hvat slag er myndin (t.d. málningur, fotomynd, viðgjørd mynd ella lýsing)

Hvat sæst á myndini?

- Hvat er í *forsýni*, *miðsýni* og *baksýni*?
- Er javn vág í myndini?
  Eru allir partar javnstillaðir, ella skarar onkur framúr?
- Um persónar eru á myndini, hvussu er teirra kropsburður?
  Er hann t.d. opin ella læstur?
  Hvussu eru teirra andlitsbrøgd?
  Sæst t.d. gleði, sorg, látur, grátur, líkasæla ella spenningur?
  Hvussu er samspælið teirra millum? T.d. tættleiki/frástøða?

Orðafrágreiðingar

Forsýni:	Tað er tað, sum sæst fremst í myndini
Miðsýni:	Tað er tað, sum sæst í miðjuni í myndini
Baksýni:	Tað er tað, sum sæst aftast í myndini

© Lydia Didriksen og Nám

Hvussu er myndin bygd upp?

- Hvussu er myndin skipað?
  Er hon t.d. skipað við *miðjuni sum savningardepli*, *symmetriskt*, *tríkantskompositión* ella *diagonalt*? Hvar er „*gylti skurðurin*"?
- Er *rørsla í myndini*
- Hvussu við frásjónini í myndini?
  Er hon vanlig, nær ella fjar?
- Hvussu við sjónarhorninum?
  Er talan um *ervafrásjón*, *miðfrásjón* ella *neðrafrásjón*?

Eygnariv, ljós og litir í myndini

- Hvat er *eygnarivið í myndini*?
- Hvussu við ljósinum í myndini?
  Er talan um natúrligt ljós ella ljós frá t.d. eini lampu, ella er talan um symbolskt ljós? Er skuggi á myndin?
- Hvussu eru litirnir í myndini?
  T.d. ljósir ella døkkir, *heitir* ella *kaldir*?

Umhvørvið og tíðin í myndini

- Hvar eru vit stødd?
- Hvussu er umhvørvið?
- Hvørjir lutir eru á myndini?
  Hoyra lutirnir til í okkara samtíð?
  Hvat siga teir um tíðina í myndini?
- Eru ímyndir (eisini nevnt symbol) í myndini?
- Hvussu er klædnabúnin?
  Ganga vit soleiðis ílatin í dag?
- Hvat sigur hann um tíðina í myndini?

Sigur myndin eina søgu?

- Er ein søga í myndini?
- Hvussu er huglagið í myndini?
  Hvørjar tankar og kenslur vísir myndin?
  Hvat hugsar tú, tá ið tú sært myndina?
  Hvussu upplivir tú myndina?

Tak samanum og tulka myndina

- Hvat sigur heitið um myndina?
- Hvussu hevði tú nevnt hana, um hon var tín?
- Hvørjir mótsetningar síggjast í myndini?
- Tulka myndina
- Umboðar myndin nakran ávísan samfelagsbólk?
- Kennir tú aðrar myndir, ið minna um hesa?
- Viðger myndin eitt tema, ið sæst aftur í øðrum listagreinum?

Orðafrágreiðingar

Miðjan sum savningardepil:



Symmetrisk:




Tríkantskompositión:

Diagonalt:



Gylti skurðurin:



Ervafrásjón:	sæð uppi frá og niður
Miðfrásjón:	sæð beint inn á myndaevnið
Neðrafrásjón:	sæð niðri frá og upp

Rørsla í myndini:	diagonalar linjur (linjur á skák) skapa rørslu og elva til spenning; beinar linjur skapa ró og stilli
Eygnarivið í myndini:	tað, sum fyrst fellur í eyguni

Heitir litir: Sí myndina

Kaldir litir: Sí myndina



© Lydia Didriksen og Nám